

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 01 - 2013

# 1200 nýggj størv í oljuvinnuni í Esbjerg

Vaksandi oljuvirksemið í danska partinum av Norðsjónum sæst nú av álvara aftur í danska oljuhøvuðsstaðnum, Esbjerg, har 1200 nýggj størv eru komin seinatu árini skrivar Jydske Vestkysten. Talan er serstakliga um tær tríggjar fyritøkurnar, Semco, Rambøll Olie & Gas og Maersk Oil men eisini um minni undirveitarar, sum hava havt nógv at gera í vaksandi oljuvinnuni. Danskir undirveitarar liggja eisini framvið fyri at vera partur av stóru útbyggingunum í norska partinum av Norðsjónum. Rambøll hevur júst fingið ein stóran sáttmála við Statoil í sambandi við eina umfatandi útbygging. Í Esbjerg verður nógv tosað um at gera býin uppaftur meira virkan á olju- og frálandaøkinum, eitt nú við at menna útbúgvingartilboðini.